## Verjan var álitið

**Men TB venjarin helt kortini, at í teimum báðum støðunum, tá ið NSÍ fekk mál, høvdu hansara menn ikki verið nóg avgjørdir**

NSÍ-TB
*Jóannes Hansen*

Milan Milanovic hevur gott tak á TB liðnum. Hann leggur stóran dent á, at verjuspælið er nóg væl skipað, og tað hevur verið gott skil á. Eisini leygarkvøldið metti hann, at aftastu menninir høvdu verið teir stinnastu, men hann var ikki nøgdur við tær báðu støðurnar, sum bóru mál við sær:

- Júst í teimum báðum støðunum vóru vit ikki nóg avgjørdir. Jónstein Petersen fekk høvi at snitta innleggið í Aca Petrovic, soleiðis at málverjin varð snýttur. Hetta var fyrra málið, og í seinna førinum vóru vit ov passivir.

Tit høvdu góðan møguleika, tá ið tað framvegis var málleyst?

- Olivur Abrahamsen, Hallur Christiansen og Einar Petersen royndu allir í somu støðu, men tíverri fingu vit ikki bóltin í málið. Tað var okkara møguleiki. Eftir at teir høvdu fingið málini, vóru teir fleiri ferðir nær við, og eg kann einki siga til, at teir vunnu við tveimum málum, heldur Milan Milanovic.

NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, var sjálvandi stak væl nøgdur við, at tað hevði eydnast hansara at fáa øll stigini.

- Eftir at teir høvdu fingið javnleik fyrru ferðina, teir vóru her, og eftir at vit høvdu tapt tvær tær seinastu ferðirnar, var tað sera týdningarmikið hjá okkum at fáa øll stigini. Tað eydnaðist, og nú eru vit væl við aftur. Tað er hugaligt, og spælararnir eiga rós uppiborið fyri avrikið, heldur Trygvi Mortensen.

NSÍ-TB 2-0 (1-0):

# NSÍ skumpaði undir stevnuhýrin

**Tvørámenn megnaðu ikki at gera mál, tá ið teir í 1. hálvleiki høvdu risa stóran møguleika, og teir megnaðu ikki at svara aftur, tá ið NSÍ kring steðgin skoraði tvær ferðir**

NSÍ-TB
*Jóannes Hansen*



*Ike var aftur á liðnum hjá NSÍ, og hetta gav venjaranum ein eyka trumf í royndunum at umskipa liðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tvørámenn møttu leygarkvøldið á stevnuni í Runavík við somu verjuuppstilling, sum teir høvdu, tá ið TB í triðja umfarinum megnaði 1-1 á vøllinum við Løkin. Ta ferðina var tað ikki fyrrenn við síðsta sparkinum, at NSÍ skoraði og harvið javnaði leiðsluna, sum gestirnir av Tvøroyri høvdu havt stóran part av tíðini.

Hesa ferð vildi NSÍ venjarin ikki hava gongdina endurtikna frá fyrru uppgerðini. Tí hevði hann rokerað ikki so lítið. Miðvallarkrumptappurin Jústinus R. Hansen var leikbannaður. Christian Høgni Jacobsen var undir liðini á Helga L. Petersen í sentralu ódnunum, og Óli Hansen, sum seinastu árini hevur verið miðverji, var hesa ferð á toppinum saman við Ike, meðan Dánial Hansen var miðverji saman við Viggo Johannesen.

NSÍ tóktist vilja hava málið beinanvegin, sum ætlaðist at bera við sær, at fyritreytirnar hjá tvøráonnum hvurvu. Men tað gekk striltið við tí, og í 1. hálvleiki vóru NSÍ álopini, sum bóru spentar støður og royndir ímóti málinum við sær, rættuliga fáar. TB verjan var ógvuliga stinn, og tá ið tað endiliga eydnaðist heimamonnunum at stríða seg ígjøgnum í borðunum, so vóru innleggini ikki nóg neyv, ella koma tey ov seint í brotsteigin, og so vóru tað stinni TB málverjin og svart/hvítu høvdingarnir í luftspælinum, sum vóru omaná.

TB venjarin uppmuntraði sínar menn stútt og støðugt at spæla og ikki at sparka, tá ið teir fingu fatur á bóltinum. Ikki allir TB spælararnir tordu eins væl at halda upp á bóltin og at bjóða seg til, men teir royndu, og einstakar ferðir settu teir NSÍ málið undir trýst. Í sambandi við deyðbóltsstøður sendu teir fleiri av stóru monnunum fram í NSÍ brotsteigin. Tað tóktist sum um, at teir satsaðu nógv upp á hesar støðurnar, og tí kendist tað undarligt, at innleggini frá hornaspørkum og fríspørkum ikki altíð vóru so neyv.

TB hevði risa møguleika at fáa mál og harvið at fáa tær fyritreytirnar, sum kundu havt borið stig við sær. Eftir horna úr vinstru og dygst framvið stútara frá Óla Johannesen við handara stólpan, vunnu tvørámenn bóltin á miðjuni. Álopið endaði við innleggi úr høgru og trimum royndum ímóti NSÍ málinum úr góðari støðu. Men tað spurdist ikki mál burturúr, og tað varð lagnuløtan hjá TB.

### Málini

Í lítlu løtuni kring steðgin fekk NSÍ tvey mál. Tað var avgerandi fyri, at øll stigini vóru eftir í Runavík. Eftir málið tíðliga í 2. hálvleiki loysnaði tað hjá heimaliðnum, og teir kundu havt fingið uppaftur fleiri mál. Tað gjørdu teir ikki, men tá ið fyrra uppgerðin á heimavølli ímóti TB verður havd í huga, so sigur tað seg sjálvt, at teir í NSÍ vóru stak væl nøgdir at hava vunnið við tveimum málum.

Fyrra málið varð Jónstein Petersen skrásettur fyri. Mitt á TB hálvuni skundaði NSÍ sær við frísparki. Bóltурin endaði í vinstru hjá Einari Hansen, sum sendi innfyri, og tað kann gott vera, at ein av verjumonnunum hjálpti væl til at fáa bóltin í málið.

Stutt eftir steðgin staðfesti Helgi L. Petersen heimasigurin. Eftir eitt sindur av aftur og fram í brotsteiginum smekkaði miðvallarin bóltin inn um stinna Predrag Markovic. Heimaáskoðararnir fegnaðust, og tað gav eyka skump undir stevnuhýrin, at NSÍ eftir dystarlok fekk handað ognarsteyp.

### Fakta um dystin

**NSÍ-TB 2-0 (1-0)**
**1-0:** Jónstein Petersen 42.
**2-0:** Helgi L. Petersen 46.
**Dómari:** Páll Augustinussen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Dánial Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen - Christian Høgni Jacobsen, Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen (Páll M. Joensen, 67.) - Ike Onyema (Bogi Løkin, 75.), Óli Hansen
**Gult kort:** Helgi L. Petersen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic (Mortan Enni, 60.), Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Einar Petersen, Alexander Jovevic, Birgir Rasmussen (Búi Mortensen, 66.), Olivur Abrahamsen - Hallur Christiansen (Allan Poulsen, 78.), Emmanuel Larbi
**Gult kort:** Birgir Rasmussen

# Viggo verður í NSÍ

**Verjuspælarin gjørdi í vikuni, sum fór, avtalu um at halda fram í Runavík næsta kappingarár**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

Viggo Johannesen verður eisini í framtíðini NSÍ spælari. Sambært fjeppara heimasíðuni hjá NSÍ so var avtala undirskrivað hósdagin millum Viggo Johannesen og NSÍ. Avtalan ber við sær, at Viggo Johannesen, sum í vetur flutti úr Fuglafirði og til Runavíkar at spæla, eisini í 2006 fer at umboða NSÍ.

Viggo er uppvaksin í ÍF, og tað tóktist at koma eitt sindur óvæntað í Fuglafirði, tá ið Viggo í vetur fór at venja í Runavík, har hann nú býr. Spurningurin var eisini, um tað fór at eydnast honum at vinna sær sama fasta plássið í miðverjuni, sum hann hevði havt í Fuglafirði. Fyrstu tíðina var Viggo ikki so fastur á liðnum, men seinastu ferðirnar hevur hann verið fastur í miðverjuni. Nú tykjast hann og NSÍ at vera so fegnir um samstarvið, at partarnir hava givið hvørjum øðrum undirskriftina uppá, at tað eisini skal vera galdandi næsta ár.